# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI
# ~~MATR. NR. 864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c við Dalavegin~~Lagatrøð, Tórshavn

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, 864a, 864c, 864e, 864f, 864g, 864h, 864l, 864q, 864r, 864s, 864t, 864u, 864v, 864x, 864y og 864z~~864a, 864e, 864f, 864g, 864h og 864c~~ við ~~Dalavegin~~Lagatrøð, Tórshavn og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

## §2. FRÁGREIÐING UM ØKIÐ

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtykt er at skipa bústaðarbygging á økinum.

Stk. 2. Útstykkingin er uml. 6900 $m^2$ til støddar og liggur í einum A1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini kann brúkast til bústaðir.

Stk. 3. Útstykkingin hevur 12 grundøkir til sethús og tvíhús, 1 grundøki við ástandandi sethúsum, fríøki, felags parkeringspláss og felags reinsiverk.

Stk. 4. Grundøkini eru uml. 400-700 $m^2$ til støddar.

Stk. 5. Vegir, felagsøkir og gøtur skulu gerast sum sýnt er á kortskjali 2.

Stk. 6. Stórigarður er í økinum og skal hesin varðveitast. Um grivið verður á grundøkjunum, sum deila mark við Stóragarð, skal hetta gerast í samráð við kommununa.

Stk. 7. Sambært kap. IV, §5, stk.2 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu skulu grundøkini í A1-økjum vera í minsta lagi 500 $m^2$. Tá byggingin verður framd eftir serstakari byggisamtykt, kann býráðið loyva, at grundstykkini eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum, ketu- ella raðhúsum. Ein partur av minstuvíddini kann verða lagdur sum felagslendi og sum bilstøðil.

Stk. 8. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS

Stk. 1. Økið, sum byggisamtyktin regulerar skal nýtast til stakhús og tvíhús.

Stk. 2 . Eisini er møguligt at hýsa minni virksemi, ið eru flokkað í umhvørvisflokki 1 í umhvørvisflokking fyri vinnustykkir í Tórshavnar kommunu.

Stk. 3. Hetta virksemið skal avmarkast soleiðis, at tað ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur.

## §4. VEGIR

Stk. 1. Vegir skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. BYGGING OG STØDD HÚSANNA

Stk. 1. Byggistigið má í mesta lagi verða 0,3.

Stk. 2. Nýtslustigið fyri stakhús má í mesta lagi verða 0,6 og 0,7 fyri tvíhús.

~~Stk. 3. Útrokning av nýtslustigið er samsvarandi kap. IV, §27 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.~~

~~Stk. 4. Mest loyvda hædd av húsum er 9,0 m frá planering.~~

Stk. 5. Aðrar ásetingar viðvíkjandi bygging skulu verða í samsvar við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu.

## §6. BYGGING IÐ ER

Stk.1. Henda byggisamtykt er ikki til hindurs fyri, at núverandi lóglig bygging verður varðveitt, ella at hildið verður fram við lógligari nýtslu av eini ogn.

Stk. 2. Ikki er loyvt at vaksa um hús við at byggja um, ella at taka tey til aðra nýtslu ímóti reglunum í byggisamtyktini.

## §7. BYGGINGARMYNDULEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggingarmyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §8. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR HENNI.

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
Býarskipanardeildin

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 864a, e, f, g og h við Dalavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Yvirlitskort | | | | |
| **Kort** | 1 | | | | |
| **Dagur** | 11.05.2018 | **Mát** | 1:2000 | **Tekna** | RVH |




| | |
|---|---|
| **Tórshavnar Kommuna** | **Býarskipanardeildin** |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 864a, e, f, g og h við Dalavegin | | | | |
| **Undirheiti** | Skipan av øki | | | | |
| Kort | 1 | | | | |
| **Dagur** | 11.05.2018 | **Mát** | 1:500 | **Tekna** | RVH |